## Cola-kríggið koyrir enn




9 mió kr. Tað var tað, sum Edmund Duhaney, Ibrahim Dimons og Joya Williams vildu hava frá Pepsi, tá teir søgdu seg vilja selja upplýsingar um Coca Cola til æviga kappingarneytan, Pepsi. Ætlaða sølan varð tó uppdagað, og nú standa tey trý fyri ákærum um ídnaðarnjósning, har revsiramman er upp í 10 ára fongsul.

## Trupulleikar við Explorer 7.0

Nýggjasta útgávan av Internet Explorer hjá Microsoft tykist nú geva brúkarunum fleiri trupulleikar. Serliga tí skipanin nýtir sonevnda CCS-standardin, sum millum annað hevur gjørt fleiri e-handlar ónýtiligar. Trupulleikin gerst ikki minni av, at flestu brúkarar av eitt nú Explorer 6.0 hava sjálvvirkandi updatering av skipanini, og tí kann teldan sjálv skifta til útgávu 7.0, uttan at brúkarin hevur ynski um hetta.



# Norrøna "testar" havnina í Ánum

**Smyril Line gjørdi av at avlýsa ferðina hjá Norrønu til Íslands í gjár, tí veðrið í Íslandi var so ringt. Samstundis ynskti felagið at "testa" havnalagið í Ánum, sum verður trygdarhavn hjá Norrønu í vetur**

VETRARHAVN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Norrøna fór ikki til Íslands í gjár, sum hon sambært ferðaætlanini skuldi fara.

Hendrik Egholm, marknaðarleiðari á Smyril Line, sigur, at felagið gjørdi av at avlýsa ferðina til Íslands hesaferð, tí illveður var í Íslandi.

- Vit hava ógvuliga fá ferðafólk á hesi farleiðini í vetrarhálvuni, og í gjár skuldu 40 ferðafólk við Norrønu til Íslands.

Hann sigur, at ferðafólkini í staðin fara yvir til Íslands við flogfari.

Nakað var eisini av farmi, sum Smyril Line eisini loysir á onkran hátt.

### Í Ánir

Hendrik Egholm sigur, at Smyril Line gjørdi av at royna havnina í Ánum í morgun – ella at "testa" tað, sum Klaksvíkar kommuna higartil hevur gjørt har norðuri, so Norrøna kann brúka Ánir til trygdarhavn, tá ið tað gerst neyðugt í vetrarhálvuni.

- Vit vóru har norðuri í august, og tá sóu vit nøkur viðurskifti, sum máttu gerast. Nú verður so "testað", hvussu tað, sum gjørt er, virkar, tá ið skipið er í Ánum.

Hendrik sigur, at enn hevur hann ikki fingið nakra afturmelding frá skiparanum á Norrønu, men hann væntar, at okkurt fæst at vita um, hvussu vorðið er, sum dagurin líður.

### Til Noregs

Norrøna fór norður til Klaksvíkar tíðliga í morgun og verður væntandi aftur á Havnini seinnapartin.

Marknaðarleiðarin sigur, at Norrøna fer aftur í reglulíga sigling hósdagin, tá ið farið verður av Havnini til Noregs.

- Síðan siglir skipið aftur eftir ferðaætlanini aftur, sigur Hendrik Egholm.

# Búskaparvøkstur ten

**- Tað er umráðandi, at vit syrgja fyri, at okkurt er at koma eftir her á landi – fyri øll, sum kunnu geva eitt ískoyti til upplivingarbúskapin. Tað er eisini umráðandi, at vit kunnu bjóða bestu arbeiðsmegini bestu møguleikar fyri at liva og virka her á landi, segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, tá ið hann setti ráðstevnu í Norðurlandahúsinum**

VINNUSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hósdagin var vinnuráðstevna í Norðurlandahúsinum, sum Menningarstovan og Elin Heinesen skipaðu fyri. Heitið á ráðstevnuni var "Kreativitetur, innovatión og upplivingarbúskapur".

Dagurin byrjaði klokkan 9.30 og endaði klokkan 17.

Á skránni vóru fleiri fyrilestrar um evnið, og endað varð við stórum pallborði undir yvirskriftini: "Hvussu fáa vit meira samstarv millum vinnu og mentan" og "Hvussu kunnu vit brúka upplivingarbúskap í Føroyum".

Á næstu miðsíðunum hevur Kim Simonsen, sum sjálvur var við í pallborðinum, ymiskt tilfar frá ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum.

### Virðir og upplivingar

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, setti vinnuráðstevnuna, og í røðu síni segði hann seg fegnast um, at hann hevði fingið hetta høvið.

- Vit hava í okkara vinnupolitikki uppskot um, hvussu karmarnir fyri føroyska vinnu kunnu betrast og útbyggjast á teimum økjum, sum hava størstan týdning fyri vinnuna.

Hann segði, at í vinnupolitikkinum verður haraftrat eisini víst á, at búskaparvøkstur í stóran mun er tengdur at, hvussu góðar fyritreytirnar eru fyri eitt nú nýskapan – ella innovatión, sum tað eisini verður rópt.

Í røðuni vísti hann eisini á, at tey, sum hava áhuga í at vita meira um vinnupolitikk landsstýrisins, kunnu fara á heimasíðuna hjá Vinnumálaráðnum (VMR).

- Framtíðin hevur við sær stórar avbjóðingar. Tað er ikki longur einans siðbundni rávøru-og framleiðsluídnaðurin, sum tryggjar vøkstur. Nú verður dentur eisini lagdur á aðrar eginleikar, har stór virðir verða skapt gjøgnum upplivingar. At vit eru ávegis til meira fjøltáttað vinnumynstur, er valutainntøkan í samfelagnum dømi um, segði landsstýrismaðurin.

### Handilsligt og listarligt

Bjarni Djurholm setti spurningin, hvat skal til fyri at klára seg í alheimsgjørda upplivingarsamfelagnum, og hvussu brynja vit føroyska vinnulívið til at møta hesum nýggju avbjóðingum.

- Sum víst verður á í vinnupolitikkinum, skal nýskapan til, um vit vilja arbeiða saman tvørtur um siðbundin yrkismørk og skapa grundarlag fyri nýggjum vinnum, nýggjum vørum og nýggjum verkætlanum.

Og landsstýrismaðurin helt fram:

- Eg havi skilt, at henda ráðstevnan snýr seg um at varpa ljós á upplivingarbúskapin, og hvussu vit kunnu sameina skapandi – handilsliga og listarliga – fatan og seta fokus á upplivingarsamfelagið, sum verður drivið av nýskapan, nýhugsan, tøkniligum know-how og vørumenning.

Hann setti eisini spurningin, hvussu vit kunnu fáa allar aktørar við, bæði fólk í vinnulívi, handli, tøkni, list, tónleiki, mentan, ítrótti, gransking, útbúgving, design, arkitekturi – umframt politikki, samskifti og marknaðarføring.

- Jú, hetta er sanniliga ein stórur biti, helt landsstýrismaðurin fyri.

### Góður gróðrarbotnur

- Tað er umráðandi, at vit syrgja fyri, at okkurt er at koma eftir her á landi – fyri øll, sum kunnu geva eitt ískoyti til upplivingarbúskapin. Tað er eisini umráðandi, at vit kunnu bjóða bestu arbeiðsmegini bestu møguleikar fyri at liva og virka her á landi.

Bjarni Djurholm helt fyri, at føroyskar vørur umboða eina "nichu" á altjóða marknaðinum, sum hevur góðan møguleika at vekja ans.

- Tað týdningarmesta er sjálvandi at hava nakað munagott at bjóða øðrum,

